# Innangarðsútskifting í Kvívík









**Ár 2016, mikudagin 7. des. kl. 19 varð útskiftingarfundur settur í *Glæmuni* í Kvívík at viðgera mál um innangarðsútskifting í Kvívík.**

Fram varð lagt:

<u>Skjal nr. 1</u>: Lýsing í Sosialinum 2. sept. 2016.

Lýst varð í svørtutalvu í Kvívík og á heimasíðunum hjá kommununi og hjá Umhvørvisstovuni.

2. des. 2016 varð aftur lýst í og Sosialinum, og fundurin varð kunngjørdur í útvarpinum fundardagin.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingarháttin, svaraði eingin.

Formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.

<u>Skjal nr. 2</u>: Grannastevnuviðtøkan frá 11. apríl 2006 við tilhoyrandi skjølum og góðkend av Búnaðarstovuni 29. august 2006.

<u>Skjal nr. 3</u>: Skriv frá Innlendismálaráðnum dagfest 28. januar 2009, har Petur Nielsen er uppnevndur til útskiftingarformann.

<u>Skjal nr. 4</u>: Útskrift úr rættarbókini 30. jan. 2007, har Hjørleif Kúrberg, Tórshavn, og Inger Merete í Brekkunum, Hósvík, til nevndarlimir.

Tey hava bæði borið seg undan nevndararbeiðinum, og í teirra stað taka Eyðfinn S. Hansen, Klaksvík, sum 1. varamaður og Heini á Heygum, Vestmanna, sum 2. varamaður sæti í nevndini.

Víst varð til § 10, har útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja hetta. Málið varð ikki tikið aftur.

Habiliteturin varð viðgjørdur. Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara í Kvívík, at tað nemur teirra habilitet.

Eingin hevði viðmerking til habilitetin, og er nevndin skipað soleiðis:

Petur Nielsen, formaður
Eyðfinn S. Hansen, nevndarlimur
Heini á Heygum, nevndarlimur

Nevndarlimirnir hava áður skrivað undir hesa váttan sambært § 5, stk. 2:

*"At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevnarlimi, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum."*

Um 30 eigarar vóru møttir.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal, Óli Johansen og Arnold Thomassen.

Nevndin hevur kannað eigindómsviðurskiftini.

Í Kvívíkar bygd eru góðir 600 eigindómar við íalt knøppum 1.750 lutum. Eigararnir eru o.u. 420.



Sambært § 2 í útskiftingarlógini er grundarlag fyri útskifting, og

**ásett verður: Útskifting innangarðs av Kvívíkar bygd verður at fremja.**

Matrikulin og matrikulkortið verða grundarlagið undir útskiftingini.

Skjal nr. 5: Eigarararalistar fyri Kvívík.



Formaðurin greiddi frá, hvussu skiftið fer fram, og hvør eigaranna lutur í skiftinum er.

Greitt varð frá, hvussu umráðandi tað er, at góðskumetingin er røtt, og heitt varð á eigararnar at uppnevna fólk at hjálpa nevndini at áseta miðalgóðsku fyri tey ymisku økini.

Uppnevnd vóru: Hans Martin Andreasen
Tummas Marni Joensen
Dánjal Petur Müller
Randi Jacobsen
Niclas Joensen.

Tosað varð eisini um garðahald. Eigararnir í Ognarhaganum halda garðarnar frá Vestmannasundi og norður til Stykkjabreiðá. Frá Stykkjabreiðá og fram til Leynará halda eigararnir Frammi í Haga garðarnar. Upplýst varð, at Frammi í Haga hava nøkur gerði garðsskyldu.

Kort og eigaralistar liggja frammi á kommunuskrivstovuni, og skjølini er eisini tøk á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni: www.us.fo.

Fundurin lokin kl. uml. 20:30.

**Góðskumetingin**

Eftir útskiftingarfundin varð fundur settur í køkinum í Glæmuni at viðgera góðskumetingina innangarðs í Kvívík. Nevndin møtti fullmannað.

Fyri eigararnar møttu Hans Martin Andreasen, Tummas Marni Joensen, Dánjal Petur Müller, Randi Jacobsen og Niclas Joensen.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal, Óli Johansen og Arnold Thomassen.

Tosað var um lendi út frá matrikulkortinum og litflogmyndum av øllum innangarðs.



Besti bøurin varð mettur at vera frá Norðaru Breiðá og heim á Heyggin. Góðskan fellur so Norður í Bug. Somuleiðis er verri góðska frá á Heygnum, Fram í Gerði, Út á Bø og Út á Leiti. Úti á Leiti er so at siga óvelt og ringt atkomuligt og tí at meta sum ringasti bøur. Yviri í Gerðum er góður djúpur bøur, men her er nakað lægri góðska enn besti bøurin. Yviri í Heygum er grunt, og tískil verður tað lægri mett.

Ætlandi fer nevndin at ganga um bøin í komandi viku.

Fundurin var lokin kl. uml. 2130.

**Metingin**



Byrjað varð 13. desember 2016 við at høvuðsmeta bøin.
Byrjað varð á Stykkinum, og síðan var farið til Kvívíkar og endað var norðuri í Sundum.
Høvuðsmetið varð sett á kort.

Tann 2. mars 2017 varð sjøtul settur á at meta hvønn lut. Gingið varð um bøin í 4 dagar. Fyrst varð farið norður eftir gøtuni Norður í Sund. Haðani var leiðin sett heim í bygdina og yvir í Gerði og 10. mars varð endað á Klivunum.

Síðan skuldi metið setast á kort. Nakað kundi takast upp á myndakorti, men neyðugt var við eini størri uppmáting. Tá var at passa kort til og gera eigaralistar. Ein í navnarað og ein sum er skipaður eftir matrikulnummari.

**Tann 6. februar 2018 kl. 13.00 var nevndarfundur á Umhvørvisstovuni. At viðgera vóru tvey mál,metingina og gerðisstykkini.**

Nevndin var fullmannað: Heini á Heygum, Eyðfinnur Hansen og Arnold Thomassen, formaður.
Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal og Óli Johansen.

Metið, sum varð ásett í mars mánað 2017 varð gjøgnumgingið og kannað. Kort, listar, teknlýsing o.a. varð gjøgnumgingið.

Seinna málið var um gerðisstykkini.

Nevndin hevur fingið framlagt eitt mál frá Ognarhaganum viðvíkjandi endurgjaldi til leigarar av Frammigerði í samband við sølu av lendi til kommununa.

Nevndin heldur ikki at eitt fíggjarmál hjá haganum er eitt mál, ið úrskiftingin skal taka sær av, og vísir tað frá sær.

Tosað var um gerðisstykkini og søgu teirra.

Nevndin skuldi taka støðu til eftir hvørjari § í Útskiftingarlógini gerðisstykkini skuldu viðgerðast.

Í "Lov nr. 147 af 7. marts 1939 om Udskiftning, som senest ændret ved lagtingslov nr. 110 af 29. juni 1995" eru tvinnir møguleikar § 41 ella §42.

Nevndi metir at við teimum skjølum, hon hevur kunnleika til, er **onki** sum talar fyri at gerðisstykkini skulu viðgerast eftir §42.

Tí verður ásett, at gerðisstykkini verða viðgjørd eftir § 41 og **IKKI** eftir § 42 í Lov nr. 147 af 7. marts 1939 om Udskiftning, som senest ændret ved lagtingslov nr. 110 af 29. juni 1995.

Áðrenn fundurin varð slitin varð tosað um, hvussu farast skal fram á útskiftingarfundunum.

Fundurin varð slitin kl. 15.00.

**Hóskvøldið 8. februar 2018 kl. 19.00 varð útskiftingarfundur settur í Glæmuni í Kvívík til at viðgera málið um innangarðsútskifting av bygdini.**

Fyri nevndina møttu:
Heini á Heygum, Eyðfinn Hansen og Arnold Thomassen, formaður
Frá Umhvørvisstovuni: Jógvan Frýdal, Óli Johansen og Ronni Thomassen

Á fundinum møttu 56 eigarar.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 6: Lýsing í Dimmalætting og Sosialinum, har boðað verður til fundar. Lýst er eisini í kunngerðatalvuni, í Kringvarpinum og á heimasíðunum hjá Kvívíkar kommunu og hjá Umhvørvisstovuni.

Formaðurin spurdi, um nakar mótmælti lýsingarháttinum. Tað gjørdi eingin, og formaðurin lýsti fundin lógliga lýstan og settan.

Skjal nr. 7: Skriv frá Innlendismálaráðnum dagf. 28. februar 2017, har Arnold Thomassen verður útnevndur til formann. Hann hevur áður skrivað undir hesa váttan sambært § 5, stk. 2:

*" At eg vil leggja mær eina við og óheftur útinna tær skyldur, sum liggja á mær sum útskiftingarnevnarlimi, tað vátti eg við hond míni undir trúnaðartreytum."*

Formaðurin las gerðabókina.

Avrit av gerðabókini er á heimasíðu Umhvørvisstovunar (www.us.fo), har eisini skjølini v.m., ið hoyra útskiftingarmálinum til, eru tøk.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 8: **Góðskumeting av jørðini saman við eigaralistum.**

Tilfarið liggur frammi á kommunuskrivstovuni og á Umhvørvisstovuni. Tað er tøkt á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni (sí omanfyri), og á www.kortal.fo, ið er serlig tænasta, har til ber at síggja og kanna metið.

Formaðurin greiddi frá, hvussu farið varð fram undir góðskumetingini. Síðan var greitt frá kortum og listum.

Viðmerkingar viðvíkjandi góðskumetingini skulu vera kunnaðar nevndini í seinasta lagi 12. mars 2018.

Nevndin tekur skjótast gjørligt støðu til møguligar viðmerkingar, og góðskumetingin verður síðani latin til ákæru.

Møgulig kæra skal sendast:
Yvirútskiftingarnevndin við Sorinskrivaranum,
C. Pløyensgøta 1, postboks 28,
110 Tórshavn.



Hetta verður kunngjørt, og kærufreistin, sum er 3 mánaðir, verður ásett.

**Ynski**
Tá góðskumetingin er staðfest, verður farið undir at gera fyribilsplan ella uppskot til skiftiplan. Metta víddin hjá hvørjum eigara sær er grundarlagið undir planinum, men eigararnir hava nú møguleika at siga nevndini, hvar teir ynskja jørð sína lagda út.
Á fundinum varð lagdur dentur á, at tað hevur stóran týdning, at eigararnir brúka henda rættin at hava ávirkan á, hvussu eigindómsskipanin í Kvívík skal vera eftir skiftið.
Tá lýst verður við kærufreistini fyri góðskumetingina, verður samstundis kunngjørd ein evsta freist, nær eigarar kunnu gera útskiftingarnevndina variga við ynski síni.

**Garðsskylda**
Eftir § 33 í útskiftingarlógini skal nevndin taka støðu til garðsskylduna og býtið av gørðunum í sambandi við útskiftingina.

Á fyrsta útskiftingarfundi varð greitt frá garðsskylduni. Garðsskyldan er áður lýst í gerðabókini sí síðu 3. Formaðurin spurdi fundarfólkið, um hugsanir eru um eina øðrvísi skipan.

Nevnt varð, at ikki allir vóru nøgdir við garðsskylduna. Spurt varð, um svarast skuldi á fundinum, men tað helt nevndin ikki.  Viðmerkingar skulu latast inn, og er freistin tann sama sum freistin til ynskini.

**Ognartøka**
Í sambandi við útskiftingina hevur tað almenna møguleika at fáa til vega lendi til almenn endamál við ognartøku sambært § 22 í útskiftingarlógini. Útskiftingarnevndin samskiftir tí við kommunu og Landsverk um teirra lendistørv, tá útskiftingarætlanin verður gjørd.

Eigarar kunnu ynskja at fáa endurgjaldið fyri ognartøkuna útgoldið, ella tað kann verða tikið av felanum, tvs. allari jørðini, áðrenn býtt verður.

**Gerðisstykkini**
Formaðurin greiddi frá gerðisstykkjunum.

Kort varð víst fram yvir bøin í Kvívík í 1861.
Hammershaimb, sum var prestur í Kvívík frá 1855-1862, tók stig til at leggja gerðini inn. Sjálvt um nógv jørð hoyrdi til bygdina, var uml. 70 % av jørðini uttanbíggjar-jørð. So sigast kann, at upprunaliga hava gerðini verið eitt slag av almannahjálp.




Í útskrift úr rættarbókini av sak nr. 115/1941 er gjølla greitt frá um gerðisstykkini.

Eitt av vitnunum, købmand Niclas Jakobsen, “der behørigt foreberedt forklarede”, at gerðini eru løgd inn í 1855-56 “efter hvad vidnets fader havde fortalt ham”.

Tey fyrstu árini varð eingin leiga kravd. “Det var meningen, at de første år var afgiftsfri, som en slags godtgørelse for opdyrkning.”

Frammi í Gerði, í taxationini nevnd felagstrøðin, verður fyrstu ferð nevnd í 1861. Tá varð hon mett til 1333 1/3 ríkisdálar.

Grundin til at gerðisstykkini ikki verða nevnd fyrr enn í 1861 er, at tá verður leiga fyrstu ferð ásett. Leigan var 5 Mark, t.e. 1,67 kr. Seinni varð hon broytt til 1 kr. og 3 leypar av hoyggi.

Av tí at sakarmálið er um rættin til gerðini, og hvussu tey verða tillutað, verður gjølla greitt frá, hvussu mannagongdin hevur verið.

Tá leigari er deyður, og arvingi hevur verið, hevur arvingurin yvirtikið gerðispartin, men tá ongin arvingi hevur verið at taka yvir, er gerðið fallið aftur til hagan, og hagastevnan hevur lutað gerðispartin til annan leigara.

Soleiðis hevur gongdin verið og er enn.

Men nakað er broytt.

Gerðini hava haft stóran týdning fyri neytahaldið í bygdini. Í dag er eingin kúgv í bygdini. So sigast kann, at felagstrøðin hevur tænt sínum endamáli, og í dag verður lítið brúkt av henni og brúkið minkar ár undan ári.

Í 70unum var brúk fyri øki til byggilendi, og tá var ein partur tikin til húsabygging. Á hagastevnu 20. mars 1975 varð samtykt at gjalda út til leigarar. Býtislykilin var 2/5 til leigara og 3/5 til eigaran. Í gerðabókini stendur eisini "og at tílíkur býtisháttur skuldi galda fyri framtíðina". Á hagastevnu 31. januar 1981 varð eisini samtykt at býta út til leigarar eftir sama býtislykli. Okkum er fortalt, tá seyðahúsið Frammi í Gerði var bygt í 1976, fekk leigarin endurgjald fyri mist lendi. Tað er ikki eydnast at finna nakað um tað í gerðabók Ognarhagans.

Í 2014 varð aftur selt av gerðispørtunum Frammi í Gerði til byggilendi, og aftur nú hevur hagin selt burtur av gerðispørtunum Frammi í Gerði til byggilendi. I samband við hesar báðar sølur hevur spurningurin "Skulu gerðisleigarar hava útgoldið endurgjald fyri sølu av gerðispørtum?" aftur tikið seg upp.

Málið var fyri á eyka hagastevnu 3. juli 2017, har ymiskar loysnir vórðu havdar á lofti. Semja var um at taka undir við uppskotinum hjá Andrass H. Arge frá Búnaðarstovuni um at lata útskiftingarnevndina taka støðu í málinum.

Við hjálp frá sakførara og sakkunnigum á Umhvørvisstovuni hevur útskiftingarnevndin fingið málið lýst.

Nevndin hevur kannað á Tinglýsingini og kannað, um nakar leigusáttmáli er. Men her komu vit aftur sum av torvheiðum.

Av tilfari, nevndin hevur fingið frá hagastýrinum, sæst, at í 2009 er eitt uppskot til leigusáttmála gjørt, men ongin av teimum er undirskrivaður. Av teimum leigusáttmálum, vit hava sæð, er bara ein undirskrivaður, og hann fevnir um fjósið í Luddagerði.



Nevndini kunnugt er ongin annar undirskrivaður sáttmáli.

Ongin ivi er um, at Ognarhagin eigur gerðispartarnar. So spurningurin er um brúksrættin/leigurættindi, sum hoyrir til gerðisstykkini.

Brúksrætturin verður umrøddur í kap. 6 í útskiftingarlógini. Her eru tvinnir møguleikar:

> § 41. Berører Udskiftning Lejer eller anden Bruger, bliver Forholdet mellem ham og Ejeren, saa vidt fornødent, at ordne af Udskiftningskommissionen.

ella

> § 42. Er Jord bortlejet (eller paa anden Maade overladt til Brug) for Brugerens Livstid eller for et Tidsrum, hvoraf mere end 25 Aar er tilbage, skal Udskiftningskommissionen, saa vidt det findes tjenligt for Udskiftningen, ved Mægling mellem Ejer og Bruger søge Jorden afhændet til Brugeren. Det samme gælder, naar intet sikkert kan oplyses om Brugstidens Længde, men Udskiftningskommissionen skønner, at Brugsforholdet maa formodes at være indgaaet for saadan Tid som ovenfor angivet.

Sum sæst verður § 42 brúkt, um talan er um lívstíðarleigu ella um leigu, har meiri enn 25 ár eru eftir av leigutíðini.

Nevndin hevur ongan kunnleika til undirskrivaðar leigusáttmálar, burtursæð frá fjósinum í Luddagerði.

Av útskriftini úr rættarbókini og frá skjølum frá hagastýrinum sæst, at søkt hevur verið um at leiga gerðispart, sum er leysgivin av fyrrverandi gerðishavara.

Í tinglýsingarlógini kap. 1 Rættindi, ið skulu tinglýsast, § 3 stk. 1 stendur:

> Brúksrættindi við hálvárs uppsagnarfreist og styttri eru gildug móti einum og hvørjum uttan tinglýsing.

So samanumtikið er onki sum talar fyri, at § 42 kann brúkast.

Tí verður avgjørt, at gerðistykkini verða avgreidd eftir § 41 í útskiftingarlógini og ikki eftir § 42 í somu lóg.

Avgerðin kann kærast, og møgulig kæra skal sendast til:

Yvirútskiftingarnevndin við Sorinskrivaranum
C. Pløyensgøta 1
postboks 28
110 Tórshavn

Kærufreistin er 3 mánaðir at rokna frá 9. februar 2018.



Nakað av tosi var, eftir at niðurstøðan varð løgd fram, og ymiskir spurningar vóru settir.

Hvat vil tað siga at gerðisstykkini verða viðgjørd eftir § 41 í útskiftingarlógini?
Jú, stutt og greitt merkir tað, at hagin skal skipa viðurskifti við gerðisleigarar. Tvs. at fáa gjørdar leigusáttmálar við gerðisleigarar. Støðan hjá gerðisleigarunum er óbroytt. Teir hava somu rættindi sum áður, og fyri at betra teirra støðu skal sáttmáli gerast millum leigara og eigara og síðan tinglýsast. Sum vera man vóru menn ymiskir á máli um niðurstøðuna.

Áðrenn fundurin varð slitin, greiddi formaðurin frá, at metkortini vóru løgd fram og møguleiki var at seta nevndini og fólkunum frá Umhvørvisstovuni spurningar.

Kort, eigaralistar og gerðarbókin liggja á heimasíðuni www.us.fo og á www.kortal.fo. Eisini liggja kort og eigaralistar frammi á kommunuskrivstovuni og á Umhvørvisstovuni.

Spurningar kunnu setast til:

Óla Johansen OliJ@us.fo
Jógvan R. Frýdal JogvanF@us.fo
Arnold Thomassen ArnoldT@us.fo

Fundurin var slitin kl. 20.15

**Tann 27. mars 2018 var nevndarfundur á Umhvørvisstovuni.**

Nevndin møtti fullmannað: Eyðfinn S. Hansen
Heini á Heygum
Arnold Thomassen, formaður

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal og Óli Johansen.

Formaður læs gerðabókina frá 20. juni og til dags dato. Eingin viðmerking var til hana.

Til viðgerðar var boniteringin, ið varð løgd fram á fundi í Glæmuni í Kvívík 8. februar 2018. Nevndin hevði móttikið eina viðmerking og viðgjørdi hana. Av misgávum høvdu tveir áarlutir eisini fingið met.

Nevndin gjøgnumgekk viðmerkingarnar staðfesti metingina við hesum broytingum:
matr.nr. 148a lutur nr. 737 broyttur til 30 %
matr.nr. 173a lutur nr. 1002 broyttur til 30 %
matr.nr. 234a lutur nr. 1250 broyttur til ovari helvt óvelt 30 % og niðara helvt velt 60.
matr.nr. 424 lutur nr. 688 broyttur til 0 %
matr.nr. 421 lutur nr. 987 broyttur til 0 %

Kort og eigaralistar verða dagførd samsvarandi (skjal nr. 9), og við kunngerð í bløðunum verður góðskumetingin latin til ákæru. Kærufreistin er 3 mánaðar frá fyrsta kunngerðardegi.

**Heini á Heygum** **Eyðfinn S. Hansen** **Arnold Thomassen**

***4. mai 2018: Úrskurðurin hjá Útskiftingarnevndini varð kærdur til Yvirútskiftingarnevndina.***

***24. apríl 2019: Yvirútskiftingarnevndin viðgjørdi málið á fundi í Glæmuni í Kvívík.***

***14. juni 2019: Gerðisleigararnir stevna Ognarhaganum og Kvívíkar kommunu eftir endurgjaldi.***

***19. juni 2019: Úrskurðurin hjá Yvirútskiftingarnevndini varð kunngjørdur.***

**Mánakvøldið 18. november 2019 var fundur í seyðahúsinum á Símunarbrekku.**

Fyri Ognarhagan møttu: Oluf Müller, form., Zacharias Guttesen, Randi Jacobsen og Petra Iversen.

Umhvørvisstovan var umboðað av Jógvan R. Frýdal. Arnold Thomassen umboðaði útskiftingarnevndina.

Eittans mál var á skrá. Eftir úrskurðinum hjá Yvirútskiftingarnevndini skulu gerðispartarnir avgreiðast eftir § 42.
í Útskiftingarlógini § 42 stk. 2 stendur, at tá talan er um felagsogn skulu eigararnir atkvøða um teir eru sinnaðir at lata teirra part til leigaran. Um leigarans lutur skal latast teimum, skulu 2/3 av markatalinum atkvøða fyri.

Næsta stig er, at hagastýrið kallar inn til hagastevnu og atkvøðast skal eftir § 42 stk. 2.

Tá klokkan var uml. 20, var fundurin liðugur.

Útskiftingarnevndin var kunnað um, at Ognarhagin helt hagastevnu í seyðahúsinum á Símunarbrekku sunnudagin 8. desember 2019 at umrøða áðurnevnda mál.

Atkvøtt var um gerðisleigararnir skuldu hava part av gerðunum. 101 gyllin 30 1/3 skinn atkvøddu móti og 36 gyllin 10 skinn atkvøddu fyri. Sostatt er málið fallið.

**Mikudagin 5. mai 2021 kl. 10 var fundur á Umhvørvisstovuni við Landsverk**

Marin Katrina Frýdal og Boði Haraldsson umboðaðu Landsverk

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal, og Arnold Thomassen form. umboðaði útskiftingarnevndina.

Samskift hevur verið við Landsverk um møguleikan at ognartaka í samband við innangarðsútskiftingina, og á fundinum varð sett á kort hvat Landsverk ynsktir at ognartaka.

Nú er nakað síðan at svingi á Stykkinum varð broytt, men á matrikulkortinum er onki hent, og nú ynskir Landsverk at ognartaka tað sum er farið veg. Avtalað var at víddirnar vóru gjørdar upp og kort gjørt og sent til Landsverk.

**Seinnapartin 6. mai 2021 var fundur hildin á kommunuskrivstovuni í Kvívík.**

Kvívíkar kommunu var umboðað av Hans Jóhann Sørensen, borgarstjóra, Rannvá Isaksen, kommunuskrivara og Elisu Abrahamsen, skrivstovufólki.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal, og Arnold Thomassen form. umboðaði útskiftingarnevndina.

Tosað var um innangarðsútskiftingina og møguleikan kommunan hevur at ognartaka í hesum sambandi. Eisini var tosað um ynsktu ognartøkuna hjá fráfarna bygdaráði.

Niðurstøðan var at kommunan skuldi endurskoða ynski hjá fráfarna bygdaráði og koma við einum nýggjum ynski til ognartøku.

Fundurin var slitin kl. 15.

***30. juni 2021: Dómurin í rættarmálinum um endurgjald verður avsagdur.***

**Í oysandi áarføri 18. oktober 2021 kl. 13.30 var fundur settur á kommunuskrivstovuni í Kvívík.**

Kvívíkar kommuna var umboðað av Hans Jóhann Sørensen, borgarstjóra, Rannvá Isaksen, kommunuskrivara og Frank Müller formanni í teknisku nevnd.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal og Jeppe S. Bruun. Fyri útskiftingarnevndina møtti Arnold Thomassen.

Kvívíkar kommuna hevði tosað um møguleikan at ognartaka, og hvat hevði teirra áhuga, og ikki minst, hvat ikki hevur teirra áhuga. Nakað var tosað um eina framtíðar íbinding úr Frammi í Gerði til landsvegin. Eisini var tosað um veg frá Norðuri á Heygum og fram móti Hellu. Annað sum eisini var nevnt var ætlaða ídnaðarøkið Yviri í Gerði, og hvørjar ætlanir kommunan hevði á Stykkinum.

Niðurstøðan á fundinum var, at kommunan ger eitt nýtt kort, har ætlaða kommunala ognartøkan verður víst, og hvørji øki kommunan ikki hevur áhuga í.

Tá klokkan var farin um nón, var fundurin liðugur.

**Mánadagin 21. februar 2022 kl. 13 var fundur settur á kommunuskrivstovuni í Kvívík**

Kvívíkar kommuna boðaði til fundar 21. februar. Arnold Thomassen hevði forfall, men av tí at ongin avgerð skuldi takast á fundinum, og kommunan bara vildi hava meira at vita um ognartøku í sambandi útskiftingar, møtti Jógvan R. Frýdal frá Umhvørvisstovuni.

Frá Kvívíkar kommunu møttu Hans Jóhann Sørensen, borgarstjóri, Rannvá Isaksen, kommunuskrivari, Frank Müller og Elisa Abrahamsen.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal.

Kvívíkar kommuna hevur viðgjørt ynskini um ognartøku og gjørt eitt kort, har ynskini vera víst. Grundgivið var fyri ognartøkuni, og hví kommunan ynskti at lata nøkur øki aftur til felan.

Kommunan hevði nakrar spurningar viðvíkjandi ognartøkuni, og Jógvan Frýdal svaraði teimum.

Fundurin var liðugur uml. kl. 14.30.

**Fyrrapartin 14. juni 2022 var fundur settur á kommunuskrivstovuni í Kvívík**

Kvívíkar kommuna var umboðað av Hans Jóhann Sørensen, borgarstjóra, Rannvá Isaksen, kommunuskrivara og Frank Müller, formanni í teknisku nevnd.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal. Fyri útskiftingarnevndina møtti Arnold Thomassen.

Kvívíkar kommuna hevur lagt fram ynski um ognartøku, men í tveimum førum var eitt stórt øki lagt av til veg. Fyri at avmarka, hvat skal ognartakast, ynskti kommunan, at útskiftingarvegurin skuldi liggja umleið 30 m omanfyri núverandi vetrarfriðing.

**Seinnapartin 14. juni 22 kl. 15.45 var fundur settur í skúlanum í Kvívík.**

Fyri Ognarhagan møttu Oluf Müller, Petra Iversen, Zacharias Guttesen og Elin Bærentsen.

Frá Umhvørvisstovuni møtti Jógvan R. Frýdal. Fyri útskiftingarnevndina møtti Arnold Thomassen.

Hagastýrið boðaði til fundar at umrøða teirra ynski í samband við útskiftingina, og hvørjar møguleikar teir hava.

Hagastýrið greiddi frá, hvørjar ætlanir teir hava í haganum, og serliga varð tosað um seyðahús Yviri í Gerði, og í tí sambandi vóru nakrir spurningar til útskiftingina. Til endans setti hagastýrið fleiri ynski fram og setti tey á kort.

Fundurin var slitin kl. 17.30.

**Góðveðurskvøldið 27. sept. 2023 kl. 19 var útskiftingarfundur settur í Glæmuni í Kvívík.**

Heini á Heygum og Arnold Thomassen umboðaðu nevndina. Eyfinn Hansen hevði forfall.
Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

23 eigarar vóru møttir.

Eittans mál var til umrøðu - framløga av ætlaðu ognartøkuni í samband við útskiftingina.

Fram var lagt skjal nr. 10 - kunngerð.




Lýst hevur verið á heimasíðunum hjá Kvívíkar kommunu og hjá Umhvørvisstovuni. Lýst hevur eisini verið í svørtutalvu og í Sosialinum.

Formaðurin spurdi um lýsing og lýsingarhátt. Tað visti seg, at hagastýrisformaðurin í Ognarhaganum hevði lagt lýsingina á Facebook vangan hjá haganum, og fleiri høvdu sæð lýsingina har. Ein eigari hevði ringt og tosað um lýsingarháttin, og at hetta kundi bøtast um.

Spurt varð, hvussu vit kundu bøta um lýsingarháttin. Nevnt varð, at lýsast kundi í útvarpi og á ymiskum Facebook vangum. Oluf Müller, hagastýrisformaður í Ognarhaganum, skeyt upp at senda lýsingina til hagapartarnar, so teir kundu kunna eigararnar.

Altumráðandi er, at so nógv sum møguligt fáa kunning um, at fundur verður hildin. Tí tekur nevndin tað til eftirtektar og umhugsar, hvussu lýsingarhátturin skal broytast til næstu ferð.

Fundurin var síðan lógliga lýstur og settur.

Gerðabókin var lisin.

Síðan var lagt til brots við at greiða frá ognartøku, lógarheimild fyri ognartøku og ognartøkumøguleikum, og um møguligt endurgjald.

Møguleiki er at ognartaka eftir útskiftingarlógini, men um ætlanin er at ognartaka meiri enn tey ásettu %, er møguligt at ognartaka eftir 1881 lógini “lov om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne”, og ikki er komið á mál, er eisini møguligt at ognartaka eftir byggi- og býarskipanarlógini “Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir”.



Tað er ikki ókeypis at ognartaka. Um ognartikið verður eftir útskiftingarlógini ella 1881 lógini, verður ein metingarnevnd sett. Í hesi nevnd eru tveir limir. Tá ognartikið verður eftir útskiftingarlógini, hevur verið vanligt, at nevndarlimirnir verða uppnevndir til metingarfólk. Tá spurt var, um nakar var ímóti, at nevndarlimirnir verða uppnevndir til metingarfólk, mótmælti ongin.

Um so er, at ognartikið verður eftir byggi- og býarskipanarlógini, verða formaður nevndarinnar og tveir málinum óviðkomandi menn uppnevndir til metingarmenn.

Um ognartikið verður eftir útskiftingarlógini, hava eigararnir møguleika at seta fram ynski um at fáa eyndurgjaldið útgoldið. Útgjaldið verður roknað eftir vídd. Ari Johanneson nevndi, at um ein hevur vánaliga jørð, loysti tað seg betri at fáa tað útgoldið.



Í útskiftingarlógini §22. stk. 4 kunnu eigararnir seta fram ynski, um teir ynskja eyndurgjald fyri ognartiknu jørðina ella ei. Er tað teirra ynski, fáa teir pening, og ognartikna metið verður drigið frá. Um so er, at teir ikki ynskja endurgjald, verður eyndurgjaldið við til at fíggja útskiftingina.

Verður ognartikið eftir 1881 lógini og byggi- og býarskipanarlógini, verður endurgjaldið útgoldið til eigararnar.

Síðan vóru kort løgd fram, sum vístu, hvat Kvívíkar kommuna og Landsverk ætla at ognartaka.

Ein viðmerking kom til ognartøkuna. Viðkomandi er serliga hart raktur av ognartøkuni, og hevði sjálvur havt ætlanir við økinum.



Greitt var frá, at tað er kommunan sum ognartekur, og møguleikin er annaðhvørt at fáa endurgjald ella fáa ta ognartiknu mettu víddina lagda út aftur aðrastaðni.

At enda var tikið saman um. Viðmerkingar viðv. ognartøkuni skulu sendast til Kvívíkar kommunu á kvivik@kvivik.fo, og ynski um endurgjald skulu sendast til us@us.fo og viðmerkja “Endurgjald fyri ognartøkuna í Kvívík”.

Freist at koma við viðmerkingum og ynski um endurgjald er 14. oktober 2023.

Tá klokkan nærkaðist 21 var fundurin slitin.

**Nýggjur nevndarlimur**
31. januar 2024 bórust boðini at Eyðfinn S. Hansen var farin um sýn 77 ára gamal.

Av tí at listin við nevndarlimum var troyttur, varð heitt á Sorinskrivaran um at uppnevna nýggjar nevndarlimir til innangarðsútskiftingina í Kvívík.

Fyrsti á listanum metti seg vera ógegnigan, og so var heitt á næsta mann á listanum, Jákup Skoradal. Formaðurin tosaði við Jákup, og hann var til dystin fús. Slekt hansara er ikki úr Kvívík, og sostatt metti hann seg vera gegnigan. Jákup er ikki ókendur innan útskiftingararbeiði, og formaðurin greiddi honum frá, hvussu leið við útskiftingararbeiðinum í Kvívík og hvat var næst á skrá.

**Nevndarfundur at viðgera fyrsta fyribilsplan.**
Týsdagin 16. juli 24 kl. 14 var kallað saman til nevndarfund á Umhvørvisstovuni.
Nevndin var umboðað av Heina á Heygum og Arnold Thomassen, fm. Jákup Skoradal hevði forfall.
Umhvørvisstovan var umboðað av Jógvan R. Frýdal. Brian Hansen, Helga Hansen og Sjúrður Steinhólm frá Umhvørvisstovuni lýddu eisini á.

Eitt uppskot til fyribilsplan varð lagt fram, og innkomnu ynskini vóru gjøgnumgingin.

Okkurt lýti var við planinum, og semja var um at rætta tað, áðrenn planurin skal leggjast fram.

Fundurin varð slitin, tá klokkan var farin av 15.

Áðrenn útskiftingarfundin í Kvívík varð planurin lagdur fram fyri Jákup Skoradal. Hann hevði ongar viðmerkingar til planin.

**Framløga av fyrsta fyribilsplani.**
Kunngjørt var at halda útskiftingarfund 18. juli kl. 19 í Frøishøllini í Kvívík, og so var.



Nevndin var fullmannað. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna, og Brian Hansen frá Umhvørvisstovuni var myndamaður.

Yvir 30 kvívíkingar høvdu lagt alt frá sær fyri at møta á fundi og síggja, hvat nú var hent í málinum.

Fundurin byrjaði við at leggja skjal nr. 14 - Kunngerð fram. Spurt var um nakar hevði nakrar viðmerkingar til kunngerðina og kunngerðarháttin. Ongin tók orðið. Fundurin var lógliga lýstur og settur.



Síðan seinasta fund bórust boðini um at Eyðfinn S. Hansen var farin um sýn. Tøkk fyri hansara leiklut í málinum.



Av tí at listin nú var troyttur, varð heitt á Sorinskrivaran um nýggja uppnevning av nevndarlimum.
Heitt var á Jákup Skoradal um at taka sæti í nevndini.
Hesum játtaði hann, og hann metir seg ikki vera ógegnigan.

Síðan var gerðabókin lisin.

Eftir hetta var tosað um gerðini Frammi í Gerði, og um dómin, sum her var sagdur.



Tað eru bara fáir leigarar sum hava ynski um at fáa sín part lagdan aftur at síni ogn, og fyri at fáa endaligt skil á hesum mugu eigararnir seta ynski fram um tað.

Síðan greiddi formaðurin frá, hvussu fyribilsplanurin var evnaður til.
Nevndin hevur fingið 35 ynski sum umboða 46 eigarar.

Bygdin er partvíst vetrarfriðað og útskiftingarøkið er stórt sæð uttanfyri vetrarfriðingina. Nevndin hevur avgjørt, at Nielsagerði, matr.nr. 270, og Luddagerði, matr.nr. 272, luttaka ikki í útskiftingini.



Grundarlagið undir útskiftingini er góðskumetingin. Áðrenn leggjast kann út, fer nakað av óbýttum. Tað er tað, sum kommunan ognartekur, og tað um nevndin brúkar til útskiftingarvegir.

Roynt hevur verið at fáa fáar og stórar lutir til hvønn einstakan eigara.
Tá planurin verður lagdur, verður eisini ein eigaralisti evnaður til, sum vísir, hvussu nógv ein skal hava lagt út, og hvar luturin er.

Viðmerkingar og spurningar kunnu setast fram innan **2. september 2024**.

Síðan var fyribilsplanurin lagdur á borðið, og møguleiki var at seta spurningar.

Fundurin varð slitin kl. 20, og tá klokkan var farin av 21, fóru tey síðstu á dyr.

**Heini á Heygum** **Jákup Skoradal** **Arnold Thomassen**



**Nevndarfundur á Umhvørvisstovuni at viðgerða annan fyribilsplan.**
Fríggjadagin 31. okt. 2025 kl. 11 varð nevndarfundur settur á Umhvørvisstovuni.

Nevndin var fullmannað. Jógvan R. Frýdal umboðaði Umhvørvisstovuna.

Gerðabókin varð lisin.

Nakað av fundarvirksemi hevur verið í samband við ognartøkuna. Nevndarlimirnir vórðu kunnaðir um nevndarinnar lut í samband við ognartøku við útskifting.

Nevndin hevur fingið uml. 28 viðmerkingar/ynski.

Viðmerkingarnar/ynskini vóru lisin og samanhildin við uppskotið um annan fyribilsplan, sum lá á borðinum.

Fleiri viðmerkingar/ynski vórðu gingin á møti. Onnur partvíst og okkurt varð ikki gingið á møti.

Nevndin var samd um at leggja tilevnaða plan fram á útskiftingarfundi í Kvívík hóskvøldi 5. nov. 2025 kl. 19.

Fundurin varð slitin hálvgum tvey.



**Útskiftingarfundur í Frøishøllini eitt dýrdarkvøld í november.**



Nevndi hevði kallað til fund 5. nov. 2025 kl. 19.

Nevndin var fullmannað. Jógvan R. Frýdal og Brian Hansen umboðaðu Umhvørvisstovuna.

Hetta vakra heystkvøld vóru 32 kvíviksingar møttir á útskiftingarfund.

Tá klokkan var farin av 19 beyð formaðurin vælkomin.



Byrjað var við at leggja skjal nr. 19 - Kunngerð fram. Spurt var um kunngerð og kunngerðarhátt.

Kunngerðin hevur staðið á heimasíðunum á kvivik.fo, jn.fo, vp.fo og us.fo. Eisini hevur kunngerðin staðið í svørtutalvu, og á trivnaðarsíðuni hjá Kvívíkar kommunu á Facebook.



Tað tykist at vera sera torført at lýsa, soleiðis at øll verða kunnað. Á sama hátt er her. Spurt var, hvussu hetta kundi gerast betur. Lýsa í útvarpinum var nevnt. Annar nevndi, at hagarnir hava bólk á Facebook, har teir kunna eigararnar. Nevndin skuldi fáa teldupostarnar hjá høgunum, soleiðis at teir næstu ferð kundu kunngera har.

Eftir eitt stutt prát var fundurin lógliga lýstur og settur.

Gerðabókin varð lisin.



Næst á skrá var stutt kunning um ognartøkuna. Ætlaða ognartøkan var løgd fram í Glæmuni 27. sept. 2023. Kvívíkar kommuna fekk onkrar viðmerkingar um ognartøkuna. Onkrar broytingar vórðu gjørdar, og kommunan sendi nevndini eina ognartøkusamtykt.

Nevndarinnar lutur í ognartøkuni er at kanna, um markið í §22.2 í útskiftingarlógini er hildið.

Nú var komið til hæddarpunktið á kvøldinum. Framløga av fyribilsplaninum. Talgilt er gott, men pappír vísir seg at hilnast betur í nøkrum førum. Tí var planurin fyrst vístur á uppvørpuni.

Ein eigarlisti er eisini evnaður til og í stuttum varð greitt frá honum.

Skjal nr. 19 - Annar fyribilsplanur og Skjal nr. 20 - Eigaralisti til annan fyribilsplan verða løgd á heimasíðuna us.fo/utskifting, og eitt eintak av kortinum kann eisini síggjast á kommunuskrivstovuni.

Freistin at koma við viðmerkingum til annan fyribilsplan er **23. november 2025.**

So vóru annar fyrbilsplanur og eigaralistin løgd á borðið. Stórur áhugi var fyri, hvat úrslit nevndin var komin til. Dúgliga var lýst og avmyndað við telefonini. Okkurt lýti var tíverri á planinum, og tað vil nevndin rætta á næsta plani. Nakað bendir á, at nevndin er komin nærri eini loysn, men enn er onkur fløkja at greiða.



Fundurin var slitin kl. 19.45, og tá klokkan var farin av 20.30, varð hurðin læst.

**Heini á Heygum** **Jákup Skoradal** **Arnold Thomassen, fm.**